# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 21.03.2016 kl. 17.30

Á fundi: Rúni Thomsen
Magni Bertholdsen
Eyðfinn Debes
Martin í Nesi
Niels J. Thomsen
Jóhan Eli Poulsen
Niels Olaf Eyvindsson (fyri Trúgva Gudmundarson)

Ikki møtt:

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka tvey mál við aftrat – koma á skrá sum mál nr. 8 og 10 – tað síðsta sum ikki alment mál.

1. **Umsókn um stuðul til Víkingadagar í Hovi.**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla.

2. **Umsókn um stuðul til túr við búfólki á Hamragarði.**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla.

3. **Umsókn um stuðul til tónleikatiltak "Ein dagur uppi í Kanada".**
   Søkt verður um fíggjarligan stuðul á kr. 20.000,- til fyrireiking av tónleikatiltaki. Samtykt varð einmælt ikki at stuðla hesum.

4. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Kvinnuhúsinum.**
   Samtykt varð einmælt eins og undanfarin ár, ikki at stuðla hesum.

5. **Umsókn um stuðul til verkætlanina "Túná Kort".**
   Samtykt varð, at Trivnaðarnevndin kannar hetta nærri.

6. **Skriv frá kirkjuráðnum í Sandvík viðv. brúk av Sandvíkar skúla.**
   Kirkjuráðið spyr um møguleikan at brúka skúlan til fundir. Hvalbiar skúli hevur brúksrætt til skúlan í Sandvík, men samtykt varð einmælt at geva kirkjuráðnum loyvi at hava fundir v.m. í skúlanum.

7. **Musikkskúlin í Suðuroy – álitið frá Løgtingsins Umboðsmanni.**
   Samtykt varð at heita á nevndina fyri Suðuroyar Musikkskúla um at halda seg til niðurstøðuna frá LUM um at hava setanarsamrøður við umsøkjarar, tá størv hava verið lýst leys og síðani innstilla til bý- og bygdarráðini, ið hava setanarmyndugleikan. Samtykt varð eisini at heita á Mentamálaráðið um at dagføra lógarverkið fyri musikkskúlar sambært niðurstøðuni frá LUM.

8. **Tilbið uppá krana hjá Hvalbiar havn.**
   Samtykt varð at siga frá, at Hvalbiar Kommuna í løtuni vil kanna møguleikan fyri at útvega annan krana, áðrenn hesin verður seldur.

9. **Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

   **Vega- og havnanevnd (framløga Eyðfinn Debes):**
   - Krani á Hamranesi: Nevndin mælir til, at krókur og wire á kranönum verða skift út beinanveg.
   - Loðsing – Hvalbiar havn: Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá Vega- og havnanevndini í sambandi við loðsing hjá Hvalbiar havn.

   **Trivnaðarnevnd (framløga Rúni Thomsen):**
   - Filmurin um Kolasøguna: Samtykt varð einmælt at stuðla filmsverkætlanini við kr. 5.000,- aftrat.

10. **Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir.  Fundur lokin kl. 19.45

Rúni Thomsen  Magni Bertholdsen  Eyðfinn Debes  Martin í Nesi

Niels Jacob Thomsen  Jóhan Eli Poulsen  Niels Olaf Eyvindsson